



**Ein nýggj byrjan**

Um hetta sigur Seamus Heany:

Tey skrivaðu teknini eru sum skaldskapurin, ein skilnaður við tað vanliga lívið, men ikki ein ábyrgdarleys flýggjan undan tí ... (Skaldskapurin) sigur ikki við ta ákærandi mannamúgvuna ella ta hjálparleysu kvinnuna: "Nú kemur ein loysn." Í staðin fyri – í gloppinum millum tað sum fer at henda og tað vit kundu hugsað okkum átti at hent – fangar skaldskapurin okkara tanka eina løtu, ikki sum hugspjaðing, men sum rein hugsavnan, ein brennidepil, har okkara megi til hugsavnan verður savnað aftur á okkum sjálv.

**Mandela og Gorbatsjov**

Nú ljóðar hetta kanska eitt sindur torskilt. Men sum eg skilji Heany, vísir hann á, at skaldskapur umboðar frælsi, eitt frælsi, sum peikar út um ta endurtøku, sum er skyld við deyða, og sum søga og politikkur oftast umboða, har hevnd elur hevnd, sum aftur elur hevnd. Sviin Olof Palme, russarin Mikhail Gorbatsjov, ísraelarin Yitzhak Rabin eru dømir um, at politikarar, sum velja hesa frælsiskós, ofta fáa ótakk afturfyri, ella eina uppaftur verri lagnu, Nelson Mandela í Suðurafrika er hinvegin eitt dømi um, at tað øvugta er møguligt.

Annars heftir ein seg í frásøgnini í Jóhannesar evangelium serliga við, at Jesus í hesi tvístøðu boyggir seg niður og skrivar á jørðina ella í sandin, sum vil hann skapa eitt nýtt univers, sveimandi uttan fyri søguna, blómandi frælst á øðrum markum.

**Horats eina ferð enn**

Ein hending frá seinna heimsbardaga tykist mær væl at lýsa hesa skaldskaparins megi til at skapa eitt rúm uttan fyri søgunnar deyðalíku endurtøku. Vit eru stødd á oynni Kreta, har bretskir hermenn og grikskir geriljahermenn hava tikið ein týskan herovasta til fanga. Í hølunum á teimum er eitt týskt herlið. Ein morgunin vakna teir úti í natúrini og síggja sólina rísa yvir kambinum á fjallinum Ida. Nú eiga vit at minnast til, at tað er kríggj, at týskarar og bretar eru deyðsfíggindar. Men í tí tann týski fangin sær tann glitrandi fjallatindin, mutlar hann fyri seg sjálvan á latíni:

*Vides ut alta stet nive candida Soracte ...*

**Skaldskaparins skái**

Hesi orð eru byrjanin á eini kendari odu (háfloygdari yrking) eftir skaldið Horats, sum eg nevndi fyrst í hesum fyrilestri. Orðini merkja: Tú sært Soracte standa hvítt og djúpt í kava ... Men tann eingilski majorurin, sum fortelur søguna, dugdi eisini latín, dugdi yrkingina uttanat og helt fram:

*... nec iam sustineant onus*
*silvae laborantes, geluque*
*flumina constiterint acuto ...*

*(teir ovbyrjaðu skógirnir*
*orka nóg illa at bera sína byrðu, og*
*áirnar eru bundnar av hvøssum gleri.)*

Og bretin helt fram og endurgav øll seks ørindini í yrkingini. Tann týski fangin brendi síni bláu eygu ímóti honum, eina góða løtu var tøgn, og so segði hann bara: "Ach so, Herr Major!" Og so fortelur majorurin:

Hetta var ógvuliga løgið. Eina góða løtu var tað, sum kríggið var hildið uppat at vera til. Vit høvdu báðir mong ár frammanundan drukkið úr sama brunni.

**Leikum fagurt**

So mikið um skaldskap øðrumegin og hinumegin søgu, politikk, kríggj og samfelag. Til seinast fari eg at venda aftur til Dead Poets´ Society og okkara góða vin John Keating. Filmurin hevur ein enda, sum er bæði syrgiligur og upplyftandi. Kanska kann ein siga, at ein John Keating við fullum seglum er ein í so sterkur drykkur fyri ein skúla.

Hinvegin er tann skúlin illa farin, sum ikki onkuntíð hoyrir málið í hesum sjarmerandi og sprækna uppreistrarmanni. Hansara yndisreglu carpe diem síggja vit intertekstuelt varieraða mangastaðni í



*Kafka, Albert Ehrenstein, Otto Pick og Lise Weltsch 7. september í 1913*

Sosialurin